Dia Midjord um samanlegging:

# Nýggir og spennandi møguleikar

**Dia Midjord, álitismaður í Útvarpi Føroya, metir, at samanleggingin av loftmiðlunum gevur nógvar nýggjar og spennandi møguleikar, sum kunnu skapa ein betri føroyskan loftmiðlaheim. Men hann er ikki nøgdur við Jógvan á Lakjuni. - Landsstýrismaðurin skjýtur fyrst og spyr aftaná, og hann vónar heldur enn at vita, sigur Dia Midjord**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Dia Midjord er ein av trimum álitisfólkum í Útvarpi Føroya, og varar hann av program- og tíðindafólkunum í ÚF. Tá vit fingu orðið á Dia mikumorgunin, hevði hann bæði herðaklapp og gleps at bera landsstýrismanninum í mentamálum og myndugleikunum sum heild.



*- Vit hava havt felagsfund við landsstýrismannin, og hann hevur eingi svar at geva okkum. Eingin kanning er gjørd av málinum, og landsstýrismaðurin hevur skotið fyrst og spurt aftaná, sigur Dia Midjord, álitismaður í Útvarpi Føroya. Hann ivast tó ikki í, at samanleggingin kann vera mennandi*

### Western politikkur

Dia Midjord er – eins og talskvinnan í sjónvarpinum aðrastaðni á síðuni - ónøgdur við framferðarháttinum hjá Jógvani á Lakjuni. Dia sigur, at neyðuga fyrireikingararbeiðið hevur ikki verið gjørt undan hesi stóru samanlegging.

– Vit hava havt felagsfund við landsstýrismannin, og hann hevur eingi svar at geva okkum. Eingin kanning er gjørd av málinum, og landsstýrismaðurin hevur skotið fyrst og spurt aftaná, sigur Dia Midjord. Hann sigur, at í verandi støðu er talan um vónir fram um vitan, og tá slíkar avgerðir verða tiknar, má nakað av vitan eisini vera fingin til vega.

– Hetta minnir ikki sørt um villa western lívið, har man fyrst plaffar niður og síðani kannar, hvat man gjørdi, sigur Dia flennandi. Á stóra felagsfundinum við mentamálaráðharran vóru hesar ákærur sambært Dia prógvaðar.

– Mentamálaráðharrin segði áhaldandi, at tað eru vit, sum eru serfrøðingarnir og skulu finna fram til, hvussu vit fáa vinning burturúr samanleggingini, og hann vísti, at hann ikki visti heilt sjálvur. Tá hann sigur soleiðis, kann eg ikki halda mær at spyrja, hví hann ikki hevur vent sær til sínar serfrøðingar frammanundan, sigur Dia Midjord.

### Skerd kapping

Eitt nógv umtalað fyribrigdi eftir avgerðina um samanlegging er kappingin á føroyska loftmiðlaøkinum, sum er ein fortreyt fyri fjølbroytni, góðsku og realiseringini av fólkaræðisligum meginreglum.

– Eg vil avgjørt mæla til, at vit varðveita tvey sjálvstøðug redaktiónsumhvørvi, í øllum førum innan tíðindaframleiðslu, sigur Dia Midjord. Spurdur, um verulig kapping kann vera í einum og sama stovna, ásannar Dia, at kappingarelementið ongantíð verður tað sama.

– Tað verður so ikki nøkur náttúrlig fair play kapping, og sjálvandi verður kappingin skerd við samanleggingini, men við tveimum sterkum redaktørum kunnu vit kanska varðveita nakað av kapping, sigur Dia Midjord.

### Nýggir møguleikar

Hóast misnøgdina við framferðarháttin er Dia Midjord ikki í iva um, at samanleggingin av ÚF og SVF opnar nýggjar og spennandi dyr, har nýggir samstarvsmøguleikar kunnu menna føroyska loftmiðlaheimin.

– Um vit eru nóg dugnalig, kann ein samanlegging saktans vera mennandi. Hóast tíðindaframleiðslan eigur at fara fram í tveimum óheftum umhvørvum, kunnu útvarp og sjónvarp saktans samstarva á t.d. mentanarliga økinum, sigur álitismaðurin í ÚF. Tá talan er um kjak, tíðarleys evni og drúgt fyrireikingararbeiði til eitt evni, sum skal á dagsskránna, eru samstarvsmøguleikarnir sambært Dia nógvir.

Umframt hetta vísir tíðindamaðurin á, at SVF og ÚF eisini kunnu samstarva undir størri tiltøkum.

– Tá valdagur ella oyggjaleikirnir eru á skránni, hava vit (ÚF og SVF) altíð runnið um beinini á hvørjum øðrum at dekka ymsu økini í berari kapping, og vit hava nærmast traðka fótasporini niður hjá hvørjum øðrum. Nú kunnu vit møguliga á ein konstruktivan hátt koordinera framleiðsluna, sigur álitismaðurin í Útvarpi Føroya, Dia Midjord, at enda.

Malan Johannesen um samanlegging:

# Vit kenna okkum vanvird

**– Starvsfólkið hevur eingi generell sjónarmið um sjálva samanleggingina, men framferðarhátturin hjá Jógvani á Lakjuni hevur verið vanvirðandi mótvegis okkum, sigur Malan Johannesen, talskvinna fyri starvsfólkini í SVF**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Síðani fríggjadagin hevur verið fundast dúgliga í Sjónvarpi. Malan Johannesen, talskvinna fyri starvsfólkini í SVF, greiðir frá, at tað bæði hava verið fundir innanhýsis, við Starvsmannafelagið og við mentamálaráðharran.



*– Um avvarðandi starvsfólk og leiðsla høvdu verið kunnaði frammanundan, høvdu møguleikarnir fyri eini góðari og friðarligari samanlegging verið størri, men eftir vanvirðandi framferðarháttin móti okkum, sum hava starvast í SVF í nógv ár, gerst misnøgdin sjálvandi sentral, sigur Malan Johannesen, talskvinna fyri starvsfólkið í SVF. Malan má nú finna seg í, at skifta frá Mikkjali Helmsdal h.m. til Jógvan Jespersen v.m.*

### Vanvirðing

Malan kann einki siga um nakran generellan hugburð millum starvsfólkini í SVF til sjálva samanleggingina, men ein felagsnevnari er grundleggjandi misnøgdin við framferðarhátt mentamálaráðharrans.

– Tað kann ikki vera rætt, at almenningurin fær boðini samstundis sum vit avvarðandi, og tað er svárt fyri okkum, at vit á ongan hátt hava verið kunnaði um avgerðina fyrr, sigur Malan Johannesen. Hon heldur, at framferðarhátturin er ímóti øllum paragraffum og reglum.

– Um avvarðandi starvsfólk og leiðsla høvdu verið kunnaði frammanundan, høvdu møguleikarnir fyri eini góðari og friðarligari samanlegging verið størri, men eftir vanvirðandi framferðarháttin móti okkum, sum hava starvast í SVF í nógv ár, gerst misnøgdin sjálvandi sentral, sigur Malan Johannesen.

### Eingin umsitingarlig sparing

Mentamálaráðharrin hevur serliga lagt dent á, at »umsitingarútreiðslur kunnu avmarkast við at leggja umsitingarligar funktiónir saman«, og Malan Johannesen sigur, at óttin er vaksandi millum starvsfólk at missa arbeiðið.

– Eg skal ikki gera meg klókan uppá fíggjarligan vinning ella tap, men umsitingin í SVF er so tunn og rak, sum hon kann vera. Eg dugi tí illa at ímynda mær, at nakað stórvegis kann sparast í umsitingini. Vit hava so eingi starvsfólk, sum leypa av, sigur Malan Johannesen.

### Eingin broyting

Malan Johannesen hevur arbeitt í Sjónvarpi Føroya síðani 1986, og hon dugir ikki at síggja stóru broytingarnar av eini samanlegging í praksis.

– Manningin í SVF arbeiðir so nógv hon kann, og tað vænti eg eisini, at tey í útvarpinum gera. Vit fara sum skilst framhaldandi at starvast í hvør sínum bygningi, so sum heild meti eg ikki, at broytingarnar fyri hyggjara og lurtara vera tær stóru eftir samanleggingina, sigur Malan Johannesen.

Samanumtikið eru hon og starvsfelagar hennara ónøgd við framferðarhátt mentamálaráðharrans, hóast tey ikki hava nakað sjónarmið um sjálva samanleggingina. Tey kenna seg einfalt vera settan til síðis í einum máli, sum fyrst og fremst ávirkar tey og kemur teimum við.

– Tað kennist svárt, sigur Malan Johannesen, talskvinna fyri starvsfólkini í SVF.



# Eitt gott íkast til svimjihylin í Nólsoy

**Hóast Ritan sigldi um Nólsoyarfjørð við tilsamans 3.600 fólkum á ovastevnu, og talið av bátum helst var um 150, gekk alt friðarliga fyri seg. – Vit, sum eru í stuðulsnevndini, hava ikki hoyrt eitt orð um illstøður. Alt lagaði seg á bestan hátt, hóast bygdin var stúgvandi full av fólki, sigur Una Hansen, kassameistari**

OVASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í ár hevur stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy gjørt av ikki at upplýsa alment, hvussu nógv ovastevnan hevur givið í peningi. Í fjør var bruttotalið 307.000 og fyrraárið 280.000 krónur. Kassameistarin, Una Hansen, upplýsir tó, at ovastevnan í ár hevur givið meira í peningi enn nakrantíð áður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Týskvøldið hevði stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy fund, har tey taldu upp, hvussu nógv ovastevnan í ár hevur givið í pengingi.

Una Hansen, sum er kassameistari hjá nevndini, sigur, at tey eru væl nøgd við tað, sum kom burtur úr, men nevndin hevur í ár gjørt av ikki at upplýsa alment, hvussu nógv stevnan gevur.

– Vit kunnu tó siga, at ovastevnan í ár hevur givið meira enn nakrantíð áður, og tað eru vit ógvuliga væl nøgd við.

Hon sigur, at dansurin í tjaldinum í skúlagarðinum vanliga kemur við tí største íkastinum, men tjaldið, sum nevndin hevur keypt og sum stóð uppi á kaiuni, hildnaðist eisini rættiliga væl. Í tjaldinum var breyð- og ølsøla.

– Tombola, kabarett og aðrir aktivitetir, sum vóru á stevnuni, góvu eisini væl av peningi, sigur kassameistarin.

### Eitt gott íkast

Eftir stevnuna síðsta ár, hevði Sosialurin samrøðu við Leo Poulsen, sum er formaður í stuðulsnevndin.

Hann upplýsti, at ovastevnan 2003 gav 307.000 krónur brutto, sum var met. Árið fyri – 2002 – gav stevnan 280.000 krónur.

Sambært Unu hevur stevnan sum nevnt sett met í ár, og tað merkir, at bruttuinntøkan í øllum førum hevur verið omanfyri tær 307.000 krónurnar.

Una sigur, at ein trupulleiki tók seg upp leygarkvøldið, tá ið dansur var í tjaldinum í skúlagarðinum.

– Tað vísti seg nevniliga, at bondini, sum fólk fingu um armin sum atgongumerki, høvdu sama lit sum bondini, ið nýtt vórðu í Hósvík kvøldið fyri. Hetta kann hava ført til, at eitt ávíst tal av fólki slapp inn í tjaldið uttan at rinda fyri atgongumerkið. Haraftrat vísti tað seg, at nøkur sluppu inn í tjaldið uttan um vanligu inngongdina.

Una er kortini væl nøgd við dansin og tær inntøkur, sum hesin gav á ovastevnuni.

### Alt gekk væl

Hóast Ritan sigldi um Nólsoyarfjørð við tilsamans 3.600 fólkum síðsta vikuskiftið, og talið av bátum helst var um 150, so er ikki líkt til, at nakar kuril var á tráðnum.

– Vit, sum eru í nevndini, hava ikki hoyrt eitt orð um illstøður. Alt gekk friðarliga fyri seg og lagaði seg á bestan hátt, hóast bygdin var stúgvandi full av fólki.

Spurd, um tveir løgreglumenn, sum sóust í gøtunum í Nólsoy fríggjakvøldið, vóru boðsendir, sigur hon, at eingin í nevndini veit, hvat teir gjørdu í Nólsoy hetta kvøldið.

– Á hvørjum ári hava vit vent okkum til løgregluna og spurt, um teir vilja koma út um fjørðin at hjálpa okkum at halda skil á, men svarið haðani hevur verið, at hetta er ikki teirra uppgáva. So, vit hava ikki ánilsi av, hvat løgreglumenninir gjørdu í Nólsoy fríggjakvøldið – og ikki leygarkvøldið, sum er kvøldið, tá ið trýstið er nógv størst, sigur Una.

# Ætla at fáa svimjihylin undir tak

**– Vit hava biðið um tilboð upp á at gera stoypiarbeiðið liðugt, soleiðis at svimjihylurin kann innilokast, sigur Una Hansen**

SVIMJIHYLURIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í afturvendandi kabarettini, sum nólsoyingar spældu á ovastevnu, »Nólsoyarbygd… ein býlingur í Havn«, var eitt skemtiligt brot um, at Tórshavnar kommuna, sum Nólsoy nú verður partur av, eigur tvey fornminni. Annað er Kirkjubømúrurin; hitt er svimjihylurin í Nólsoy!

Nú eru tey ungu í Nólsoy ófør at skemta, og tí tekur eingin hetta so tungt.

Stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy ætlar ikki, at stoypiarbeiðið, sum higartil er gjørt eystanfyri skúlan, skal koma at standa sum eitt fornminni í framtíðini.

Una Hansen, kassameistari hjá nevndini, sigur, at ovastevnan hesaferð var hin ellivta í røðini, og hon er ikki í iva um, at stevnan er komin fyri at vera.

– Hetta er eitt stórt og tungt tak, men vit fara fús aftur til verka komandi ár. Endamálið er enn sum áður at savna pening inn til svimjihylin, sum stendur í gerð í Nólsoy.

### Biðið um tilboð

Una sigur, at nú umleið helmingurin av stoypiarbeiðinum til svimjihylin er fingið frá hondini, er umleið ein miljón krónur løgd í hetta arbeiði.

– Nú hevur arbeiðið ligið stilt leingi, og enn restar nógv í, men nú ætla vit at leggja til brots aftur.

Hon veit at siga, at stuðulsnevndin hevur biðið ein arbeiðstakara um tilboð uppá at gera stoypiarbeiðið liðugt og at inniloka bygningin.

– Enn hava vit ikki fingið tilboðið, men arbeiðstakarin hevur verið á staðnum og sæð tað, sum higartil er gjørt. Hann heldur, at hesin parturin av arbeiðnum er í lagi.

Una Hansen sigur seg tó ikki duga at meta um, nær gongd kemur á aftur arbeiði.

– Men vit vóna, at ikki ov long tíð gongur, til bygningurin stendur innilokaður, sigur hon at enda.

### Eitt ódnartak

Einki er at ivast í, at tað verður eitt ódnartak hjá nólsoyingum at fáa svimjihylin í Nólsoy undir land.

Sum skilst, er svimjihylurin ikki beinleiðis við í avtaluni, sum gjørd er millum Tórshavnar kommunu og Nólsoyar kommunu, nú samanleggingin verður framd frá 1. januar komandi ár. Men á útoyggjastevnu í Hesti fyrr í summar, lovaði Heðin Mortensen, býráðslimur í Havn, hestfólki, at svimjihylurin í Hesti skuldi koma í eina trygga legu við samanleggingini.

So hvør veit? Kanska fáa nólsoyingar her eina hjálpandi hond, nú teir verða partur av tí stóru høvuðsstaðarkommununi.

## Hugnakvøld í tjaldinum

**Á hugnakvøldinum verður kappast um, hvør er sterkasti maður og fimasta kvinna í Nólsoy**

HUGNAKVØLD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú fríggjakvøldið skipar stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy fyri hugnakvøldi í tjaldinum, sum enn stendur uppi á kaiuni í Nólsoy.

Una Hansen sigur, at hugnakvøldið er ætlað teimum mongu, sum vóru við til at skipa fyri ovastevnuni í ár.

– Eg vil meta, at eini 100 fólk á ymiskan hátt vóru við til at gera stevnuna møguliga.

Hon sigur, at stuðulsnevndin nú fer at bjóða hesum fólkum til ein bita fríggjakvøldið.

– Tey mongu, sum taka sær av at skipa fyri stevnuni, hava valla stundir at halda stevnu sjálvi, meðan stevnan er, og tí skipa vit fyri hesum kvøldi, sigur Una.

Á hugnakvøldinum verður eisini kappast um, hvør er sterkasti maður og fimasta kvinna í Nólsoy.

– Hesar kappingar duttu niðurfyri á ovastevnu, tí fólk høvdu so nógv um at vera, sigur Una Hansen, sum vegna nevndina ynskir at takka øllum, ið hjálptu til.

Somuleiðis veitir hon eina hjartans tøkk til øll tey mongu, sum vitjaðu í Nólsoy á ovastevnu í ár.